## Inter og Roma í steypafinalu

Inter spældi seg í gjárkvøldið í italsku steypafinaluna. Fyrru hálvfinaluna móti Sampdoria vann Inter 3-0, og tí var málleysur javnleikur nóg mikið at senda oddaliðið í Seriu A í finaluna. Har skulu teir spæla móti Roma, sum í løtuni er á øðrum plássi í Seriu A. Roma vann samanlagt 5-3 á Milan í hinari hálvfinaluni.

## Cissé aftur á landsliðnum

Djibril Cissé hevur ikki verið á franska landsliðnum, síðani hann beint undan HM –kappingini breyt beinið í venjingardysti móti Kina. Nú er áleyparin, sum skoraði í báðum dystunum móti Føroyum í seinastu undankapping, tó aftur til reiðar. Síðani hann byrjaði at spæla aftur, hevur Cissé skotið tvey mál í seks dystunum fyri Marseille, og nú hevur Raymond Domenech tikið fyrrverandi Liverpool-spælaran út til venjingardystin móti Argentina. Eisini er Nicolas Anelka tikin við í hópin.



# n brast



*Danir hingu við høvdunum eftir hálvfinaluósigurin ímóti Póllandi. Teir raktu tó ikki dagin ímóti Póllandi, og sum heild var polski sigurin fult uppiborin.*

aði Pólland aftur við máli frá Karol Bielecki. Danmark megnaði tó at leggja seg á odda enn einaferð í undirtali, tá ið Lasse Boesen skoraði eitt sera flott mál uppá ein sokallaðan flúgvara, sum Jesper Jensen kastaði til hann.

Pólland royndi so at fara í álop í yvirali fyri at fáa tað útjavnandi málið, men Kasper Hvidt bjargaði polska skotinum, og so førdi Danmark við einum máli, og bert ein góður minuttur var eftir at spæla. Danmark fór so í álop, og her bleiv Michael Knudsen spældur púra leysur á strikuni, og so hevði hann møguleika at avgera dystin. Málmaðurin bjargaði tó royndini, og so fekk Pólland ein síðsta møguleika at javna. Hesum tók Karol Bielecki sær av sum ikki einaferð, og so máttu liðini út í longda leiktíð, eftir at vanliga leiktíðin endaði við javnleiki 26-26.

### Madsen helt Danmark í dystinum

Pólland legði fyri sum eitt ódnarveður í fyrra hálvleiki av umdystinum, og tá liðini skiftu síðu førdi Pólland við tveimum málum. Nú byrjaði stóri Lars Møller Madsen tó at taka ábyrgd. Hann hevði spælt alt annað enn væl í vanligu leiktíðini, men í seinna hálvleiki av umdystinum helt hann Danmark í dystinum. Við tveimum góum langskotum syrgdi hann fyri, at Danmark kom uppaftur á javnleik. Pólland fekk tó enn einaferð toga seg eitt mál fram um, men í síðstu sekundunum javnaðu danir, og so mátti enn ein longd leiktíð til fyri at finna ein vinnara.

### Pólland sló til

Í seinnu longdu leiktíðini legði Danmark betri fyri. Kasper Hvidt stórbjargaði í tveimum umførum rondir frá polskum leikarum, og so kundi Lars Møller Madsen leggja Danmark á odda við enn einum dundurskoti. Danir tóktust tó troyttir hesa løtuna, og nú tók Pólland yvir. Undan steðginum komu teir uppá javnt, og í seinna hálvleiki løgdu teir hart út. Teir vóru skjótir at revsa onkran danskan feil, og brádliga førdu teir við trimum málum, og so var sigurin tryggjaður.

Endaliga úrslitið gjørdist 36-33 til Pólland, sum tó mátti kempa í 80 minuttir, áðrenn teir kláraðu at basa dønum. Nú er póllendingar so klárir til HM-finaluna, har teir skulu spæla ímóti vertunum úr Týsklandi.

Heldur ikki hesaferð eydnaðist hjá Danmark at leika seg í eina HM-finalu, men danir hava alt at vera ernir av. Sjálvt um tað til tíðir hevur gingið teimum ímóti, so hava teir stríðst til síðsta mann, men hesaferð vóru teir bara ikki góðir nokk. Pólland hevði sigurin uppibornan, tí gjøgnumgangandi vóru teir heldur betri enn danir.

Týskland-Frakland 32-31

## Vertirnir klárir til finaluna

**Henning Fritz stóð enn ein branddyst, tá Týskland vann sín hálvfinaludyst ímóti Fraklandi eftir eitt satt, har liðini máttu út í dupultan umdyst, áðrenn vinnarin bleiv funnin**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

19.000 fanatiskir heimaáskoðarar stóðu klárir í Kølnarena at heppa heimaliðið, tá ið hálvfinalan ímillum Týskland og Frakland bleiv skotin í gongd. Dysturin var heldur ikki meir enn komin í gongd, so var blóðið farið á kók hjá leikarunum. Týskararnir blivu nevniliga raktir av eini dupultari útvísing tíðliga í dystinum, og hetta fekk øði í teir. Teir megnaðu tó allíkavæl at halda høvdið kalt, og tá teir aftur blivu fullmannaðir, vóru teir bert aftan fyri við einum máli.

Frakland var oman á at kalla allan fyrra hálvleik, og sjálvt um Týskland var upp á javnleiki onkuntíð, so eydnaðist Fraklandi at fara til hálvleiks við eini eitt máls leiðslu.

### Góðar verjur og málmenn

Í seinna hálvleiki gekk enn javnt á allan vegin. Tað, sum eyðkendi henda hálvleikin, var, at verjurnar og málverjarnir vóru ótrúliga stinn. Bæði liðini høvdu stórar trupulleikar við at finna vegin til málið, men Frakland hevði tó so at siga alla tíðina munin.

Tá ein minuttur var eftir, eydnaðist Fraklandi sum ikki einaferðat leggja seg á odda við einum máli, og so mátti Týskland í álop at fáa mál. Teir fingu brotskast, sum Markus Baur skoraði trygt, og so máttu liðini út í longda leiktíð.

### Fritz var aftur hetjan

Yvirtíðin var akkurát líka jøvn, sum dysturin hevði verið. Í fyrra hálvleiki skiftust liðini um at skjóta mál, og støðan var eisini jøvn, tá liðini skiftu síðu. Eisini her skiftust liðini um at skjóta mál, og tá ið Holger Glandorf enn einaferð javnaði ímóti endanum av longdu leiktíðini, so var neyðugt við enn eini longdari leiktíð, og henda gjørdist dramatisk.

Aftur hesa ferð var púra javnt í fyrra hálvleiki, og tá liðini skiftu síðu, stóð enn á jøvnum. Í seinna hálvleikibleiv sera spennandi. Her fylgdust liðini eisini fyrstu løtuna, og við støðuni 31-31 fekk Týskland brotskast, meðan teir spældu við manni í undirtali. Hetta setti Markus Baur enn einaferð trygt í netið, og so var lagt upp til ein øgiligan síðsta minutt. Heta endaði alt við, at Henning Fritz sum ikki einaferð bjargaði Týsklandi við eini fantastiskari dupultbjarging í seinastu sekundunum, og so vann Týskland fyrru hálvfinaluna.



*Enn einaferð var Henning Fritz dagsins maður hjá Týsklandi, og við sigrinum á Fraklandi hevur Týskland nú leikt seg í finaluna á heimavølli.*